Havnarmeistari til Leirvíkar kommunu

Leirvíkar Kommuna arbeiðir við at betra um umstøðurnar á havnarøkinum og á bingjuplássinum.

Munandi útbyggingar verða framdar av havnarøkinum komandi árini, samstundis sum ætlanin er at økja um viðlíkahaldið og eftirlitið við havnarøkinum, sum fevnir um økið innanfyri grótkastið við ferjuleguna til grótkastið á Kráartanga.

Frá fyrst í komandi árið verður bingjuplássið skipað sum endurnýtslupláss í IRF-skipanini og skal plássið tí vera mannað, tá ið tað er opið.

Leirvíkar kommuna søkir tí eftir einum havnarmeistara at arbeiða fulla tíð frá 01. mars 2004 ella skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávurnar eru:
- Viðlíkahald og eftirlit við øllum havnarøkinum, bátahylinum og øllum bátadráttum v.m.
- Umsjón við bingjuplássinum og vera á plássinum, tá ið opið er.

Royndir:
- Royndir innan arbeiðsmarknaðin
- Hava eina viðkomandi útbúgving.

Lønarviðurskifti:
- Løn sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 12. januar 2004.**

Kommunan tilskilar sær rætt til frítt at velja millum umsøkjararnar ella ongan at taka.

Leirvíkar Kommuna
Postrúm 42 · 520 Leirvík

Sangvenjing á Velbastað

Eftir nýggjár verður hildið fram við kórvenjing hvørt týskvøld kl. 20.00.

Nýggir sangarar eru vælkomnir, kórleiðari er Fróði Sandoy.

Kvøldskúlin – Velbastaðar skúli

Bilur til sølu

Nissan Patrol, grønur, 5 hurðar, diesel,
árg. mai '99, el-rútar, krók, 7 setur, leður,
koyrt 81.500 km, heillakeraður í september '03.
4 nýggj dekk.

Vinarliga ring 227321
best eftir kl 18.00

Mylnuhúsið

søkir eftir pedagogum

Søkt verður eftir 2 pedagogum, at byrja uml. 1. febr. 2004.

Mylnuhúsið er ein stovnur frá 1999. Vit taka dagliga ímóti 120 børnum í aldrinum 0-9 ár. Í Myldnuhúsinum er pláss fyri at bæði børn og vaskin kunnu seta síni *spor* her, vit arbeiða í tí dagliga við okkara eygleiðingarevnum og eru upptikin av, hvat upptekur børnini, fyri síðan at leggja dagin til rættis út frá tí og leggja vit stóran dent á, at varða um øll børnini.

Vit sóknast tí eftir fólki, ið er:
- fleksibil
- hevur opið sinni
- sær møguleikar fram um mørk
- tekur støði í barninum
- tekur barnið í álvara
- er opin fyri nýhugsan
- leggur stóran dent á gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið, kommunurnar og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðan Hannu Thøgersen tlf. 457788/217788.

Umsóknir til størvini, saman við upplýsing um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 30. desember 2003.

Mylnuhúsið
Mylnugøta 10
700 Klaksvík

Føroya Postfelag

Søkt verður eftir skrivara

Føroya Postfelag søkir eftir skrivara.

Arbeiðið er hálvtíðarstarv.

Afturat vanliga skrivstovuarbeiðinum, skal skrivarin taka sær av roknskapinum v.m., og verða skrivari á nevndarfundum.

Ynskiligt er at tygum kunnu byrja sum skjótast.

Umsókn verður at senda til:

Føroya Postfelag
Tinghúsvegur 15
100 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið á tlf. 217231

Stongt

Stongt verður frá 24. desember til 5. januar.

Matrikulstovan

Heimarøktin øki 3 Eysturoy

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi. Arbeiðsøki er allar kommunur í Eysturoynni uttan Eiðis- og Sunda kommunur.

Tíðarskeiðið er frá 01.01. - 31.08.04, ella at byrja skjótast til ber.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna í skiftandi vaktum.

Fyrimunur hevur umsøkjari, sum hevur kunnleika til arbeiði innan heimarøktina.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Felagið Før. Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisskrivstovuna tlf. 449249.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. sendast til:

Heimarøktin Eysturoy
Postboks 47
FO-620

Umsóknarfreist: 07. 01.04.

Limagjaldið fyri 2004

Limagjaldið fyri 2004 hækkar til 690 kr. um kvartalið.

Limagjaldið fellur til gjaldingar ávikavist í januar, apríl, juli og oktober ársfjórðingi.

Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Suðuroyar Norðari Sjúkrakassi
800 Tvøroyri · Tlf. 371371 · Fax 372371
T-post: sns@post.olivant.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu

Deildin er bindilið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til starvsfólk og borgara.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum

www.torshavn.fo

Starvsfólk við byggitekniskum kunnleika til Snarskivuna

Tekniska økið í Snarskivuni leitar eftir eldhugaðum starvsfólki.

Dámar tær at samskifta við onnur og ert tú opin og fyrikomandi, so hava vit eitt áhugavert starv til tín.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur kunnleika til byggitekniska økið, ella hevur hug at ogna tær henda førleika, tá miðað verður ímóti, sum tíðin frálíður, at tú fært eina breiða vitan um økið.

Saman við starvsfólkunum í Snarskivuni, ið virka sum eitt 'team', hevur tú møguleika fyri avbjóðingum og fært høvi til at menna tænastuna til borgaran á tekniska økinum.

Ljóðar hetta áhugavert so send eina umsókn, og greið frá tínum royndum, ella tak eitt prát við okkum í Snarskivuni, um tú ivast. Tosa við Mourits Mouritsson, deildarleiðara.

Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, lønarflokkur 3.

Umsóknin skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 5. januar 2004. Viðmerk "Snarskivan" á umsóknina.

Skrivstova felagsins er stongd frá fríggjadegnum 19. desember til mánadagin 5. januar 2004.

Somuleiðis ynskir Føroya Arbeiðarafelag limum sínum við familju og øllum viðskiftafólki, eini Gleðilig Jól og Harrans Signing í komandi ári, við tøkk fyri skjótt farna ár.

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulspedagogi/hjálpara til 12 ára gamlan drong í Klaksvík at byrja beinan vegin.

Arbeiðið hjá stuðlinum, er í tøttum samstarvi við heimið, drongin og stuðulsráðgevan, at geva dronginum ein vælskipaðan og innihaldsríkan dag.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi arbeiðstíðir, eisini vikuskifti.

Ynskiligt er, at tann sum settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Súsonnu Gaard, sosialráðgeva ella Jóruna Niclasen, stuðulsráðgeva á tlf. 410000.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvum verða at senda til:

Barnaverndarnevndina
Klaksvíkar kommuna
Postboks 2
FO-700 Klaksvík

Spirin
Zoneterapi
Oyraakupunktur
Kostvegleiðing
Sanna Hentze
Fugloyarvegur 10
Tlf 31 61 14 / 25 34 14
Viðtala Mán.-Leg. 15:00 - 19:00

ALMANNASTOVAN

Fulltrúi til Fíggjardeildina og Leiðsluskrivstovuna

Fulltrúi til Fíggjardeildina og Leiðsluskrivstovuna
Eitt starv sum fulltrúi innan fíggjar- og leiðsluøki á Almannastovuni verður við hesum lýst leyst til setan skjótast gjørligt. Starvið er skipað við ábyrgd mótvegis Fíggjarleiðaranum á Almannastovuni. Á deildini starvast í løtuni 6 starvsfólk, ið taka sær av EDV kervinum, rakstrinum og teimum lógarbundnu útreiðslunum, sum Almannastovan umsitur.

Uppgávurnar hjá fulltrúanum verða í høvuðsheitum:
- Umsita og menna arbeiðið við hagtølum, analysum og samskipa verkætlanir innan t.d. EDV
- Skrivari til fundir.
- At ráðgeva og vegleiða leiðsluni við tilfari til fundir o.a.
- Hagtalsarbeiði í samband við fíggjarætlan, fíggjarlóg og deildarroknskap
- Viðvirka í øðrum arbeiðsuppgávum á deildini.

Vit kunnu bjóða:
- Starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum.
- Starv við møguleika fyri menning fakliga og ábyrgd.
- Starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað einstaka starvsfólki.

Førleikakrøv:
Vit ímynda okkum ein persón, sum hevur:
- viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. oecon, polit ella líknandi
- hevur royndir innan EDV, herundir at kunna trekkja frá Oracle databasum og programmera í SAS
- hevur royndir innan tað sosiala umráði og fíggjarlógar arbeiði
- hevur vitan innan forsøgn- og greiningararbeiði
- hevur góðar málsligar eginleikar, bæði í skrift og talu
- góð samstarvsevni, bæði til at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki.

Lønar- og setanartreytir:
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttur Joensen, stjóra á tlf. 346421/215480 ella til Søren Bruhn, fíggjarleiðara á tlf. 346441/215478.

Umsókn:
Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og møguligum referensum skal sendast til:

Almannastovan
J. Broncksgøta 27
Postrúm 3096
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 29. desember 2003

Um Almannastovuna

Fyri at betra um tænastustøði hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.
Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni ein og at taka avgerðir.
Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjaligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.
Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.
Almnnastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landdekkani serdeildir.

Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!